# Ósemjur í skúlanum í Skopun er nakað nýtt

**– At tað vóru álvarsligir trupulleikar í skúlanum í Skopun, áðrenn Ingun Simonsen bleiv fyrstilærari, kenni eg onki til, sigur gamli skúlaleiðarin, Jógvan Adolf Johannesen**

SKÚLASTRÍÐ
*Áki Bertholdsen*



*– Tað er ikki rætt, tá ið Ingun Simonsen førir fram, at tað eisini vóru samstarvstrupulleikar í skúlanum í Skopun, áðrenn hon kom, sigur Jógvan Adolf Johannesen, sum var fyrstilærari, áðrenn Ingun Simonsen varð sett*

At tað eru trupulleikar í skúlanum í Skopun, er nakað nýtt, sum hevur tikið seg upp hesi seinastu árini.

Í hvussu so er, veit gamli skúlaleiðarin, Jógvan Adolf Johannesen, onki um, at tað vóru samstarvstrupulleikar í skúlanum, tey árini, hann var fyrstilærari.

Sostatt vísir hann aftur tí, sum júst fráfarni skúlaleiðarin, Ingun Simonsen, førir fram.

Hon sigur, at tað er onki nýtt at ósemja er í skúlanum í Skopun og at tað vóru longu álvarsligir trupulleikar, tá ið hon varð sett í 1997.

Hon vísir eisini á at tað stóra arbeiði, hon hevur lagt í skúlan. Hon sigur, at tá ið hon kom, mundi tað vera fáir skúlar í landinum, sum vóru so aftaliga, sum skúlin í Skopun, tí har var ongin útgerð og hølini vóru alt ov lág og játtanin til skúlan alt ov kargar.

Hon sigur, at hesum hetta hevur hon fingið í rættlag. Hon hevur fingið skúlan bygt út, hon hevur útvegað skúlanum nógva útgerð, skúlin er útbygdur og játtanin munandi hækkað.

Í hesum liggur eisini ein atfinning ímóti gamla skúlaleiðarnum, Jógvani Adolf Johannsen, sum var fyrstilærari frá 1970 til 1997, fyri at hava forsømt skúlan, tey árini, hann var fyrstilærari.

### Ongir trupulleikar

Men Jógvan Adolf Johannesen sigur, at tey árini, hann var skúlaleiðari, vóru ikki hesir stóru trupul leikarnir, sum vit nú hoyra um.

Hann vísir sostatt aftur, at tað vóru samstarvstrupulleikar á skúlanum, áðrenn Ingun Simonsen kom.

– At tað skal hava verið so stórir trupulleikar í mínari tíð, sum Ingun Simonsen sigur, minnist eg onki til. Tað vóru ikki samstarvstrupulleikar av nøkrum sum helst slagi, sigur Adolf Johannesen.

Hann sigur, at orsøkin til at hann fór frá, var, at hann tók av einum tilboði, allir lærarir fingu um at fara frá við eftirløn, tá ið teir fyltu 60. Hetta gjørdi hann, tí hann hevði so nógv at gera av øðrum arbeiðið, eitt nú var hann tingmaður, og tískil gjørdi hann av at sleppa lærarayrkinum. At hann fór frá, hevði sostatt onki við skúlaviðurskiftini at gera.

### Varð komið kortini

Hann dugir heldur ikki at síggja, hvussu Ingun Simonsen kann taka sær æruna av at hava bygt skúlan út og at hava útvegað útgerð og amboð, tí hann ivast ikki í, at nógv av tí var komið, sama, hvør var fyrstilærari.

– Tað eru nógvar nýggjar lærugreinar komnar í skúlan seinastu árini og tíðin nú setir heilt onnur krøv til skúlan, enn tað vóru fyrr, so tað man vera komið av sær sjálvum.

– Tíðin stendur ikki í stað og hesi seinastu árini, er skúlin í Føroyum yvirhøvur ómetaliga nógv broyttur, so sjálvsagt er eisini nógv nýtt hent í Skopun.

Jógvan Adolf vísir eisini á, at tá ið hann legði frá sær, vóru longu ætlanir frammi um at byggja skúlan út.

– Men vit mugu heldur ikki gloyma, at sera álvarslig kreppa var í øllum landinum tað allarmesta av nítiárinunum og Sandoyggin, øll sum hon var, bleiv so hart rakt sum onki annað øki í landinum, við arbeiðsloysi og fráflyting.

– Kommunurnar komu tískil í álvarsligar, fíggjarligar trupulleikar og tað rakti eisini skúlan meint, tí tað var rætt og slætt ikki ráð til at gera nakað við skúlan, ella at geva honum nakra serliga játtan. Tað hoyrir avgjørt við til søguna, sigur Jógvan Adolf Johannesen.

Hann vísir eisini á, at at Ingun Simonsen bleiv fyrstilærari í 1997, júst tá ið tað fór at ganga framá aftur, so tað er heldur ikki yvir at dylja, at hon hevur havt tíðina við sær.

# Sigurd Bærentsen: Eg eri fríkendur fyri allar ákærur

**Sigurd Bærentsen í Skopun umhugsar at kæra til landsstýrismannin í mentamálum, tí hann góðtekur ikki grundgevingarnar fyri at flyta hann í Meginskúlan á Sandi at vera lærara**

SKÚLASTRÍÐ
*Áki Bertholdsen*



*– Eg varð klagaður fyri Landsstýrinum, men landsstýrið boðaði frá, at onki hald var í kærununum og at tær tískil vórðu afturvístar. Tí meti eg ikki, at eg eri partur í ósemjuni, sum hevur verið í skúlanum í Skopun, sigur Sigurd Bærentsen, lærari*

– Eg eri fríkendur fyri allar ákærur. Tí góðtaki eg ikki grundgevingarnar fyri, at eg skal flytast í Meginskúlan á Sandi.

Sigurd Bærentsen, lærari í Skopun, umhugsar at senda eina kæru til landsstýrismannin í mentamálum.

Hann hevur verið ein av høvuðspørtunum í ósemjuni, sum hevur verið í Skopunar Skúla seinastu árini. Tað, sum er komið fram, er, at í høvuðsheitum verið talan um samstarvstrupulleikar ímillum skúlaleiðaran, Ingun Simonsen og ein av lærarunum, Sigurd Bærentsen.

Hendan ósemjan endaði fyrr í vikuni við, at Mentamálaráðið gjørdi bart og flutti báðar partarnar í ósemjuni í aðrar skúlar ar arbeiða. Sostatt var skúlaleiðarin flutt í Hoyvíkar Skúla og Sigurd Bærentsen fluttur í Meginskúlan á Sandi.

Í gjár segði Ingun Simonsen fyri Sosialinum, at hon ætlaði sær víðari við málinum, tí hon góðtók ikki viðferðina, hon hevði fingið, men hon vildi ikki siga, hvørjar ætlanir, hon hevði.

Og nú sigur Sigurd Bærentsen, at eisini hann umhugsar at kæra.

Hann ásannar tó, at avgerðina at flyta hann í Meginskúlan á Sandi, kann hann onki gera við, tí tað hevur Mentamálaráðið rætt til. Sandoyggin er eitt skúlaøki og tí kunnu lærarar flytast ímillum skúlarnar eftir tørvi.

### Fríkendur

Hinvegin vil hann ikki góðtaka grundgevingarnar fyri at flyta hann í Meginskúlan og tí umhugsar hann at kæra.

– Eg eri fríkendur fyri allar ákærur og tí meti eg meg ikki at vera ein partur í teimum trupulleikum, sum hava verið í skúlanum í Skopun, sigur hann.

Hann vísir á, at fyrstilærarin, Ingun Simonsen, fleiri ferðir hevur klagað hann fyri Landsstýrinum. Men herfyri fekk hann skrivlig boð aftur úr Landsstýrinum um, at tað var onki grundarlag fyri klagunum og at tað tí ikki varð meiri gjørt við málið, men at klagurnar vóru vístar aftur.

Hann sigur, at klagurnar frá skúlaleiðaranum snúði seg um at hann skuldi vera so trupul at samstarva við.

– Nú avgerð er tikin um at flyta meg í Meginskúlan, havi eg verið í samband við Mentamálastýrið fyri at vita, í hvørjum føri eg skuldi havt forbrotið meg, men tey kundu ikki nevna mær nøkur dømi um tað.

– Sostatt meti eg meg ikki at vera ein partur í teimum trupulleikunum, sum hava verið í skopunar Skúla. Av tí sama taki eg ikki undir við grundgevingunum og tí umhugi seg at kæra, sigur Sigurd Bærentsen.

### Friður var áðrenn

Nú sigur Ingun Simonsen, at ósemja var eisini í skúlanum í Skopun, tá ið hon kom og at talan sostatt ikki er um nakað, sum hevur tikið seg upp eftir at hon kom

– Eg havi verið lærari í Skopun í 23 ár, men kann ikki siga, at eg kenni nakað sum helst til nakrar trupulleikar í Skopun, fyrrenn hesi seinastu árini, eftir at Ingun Simonsen, varð skúlaleiðari, hvørki samstarvstrupulleikar, ella trupulleikar av øðrum slagi. Hon heldur eisini, at ein partur av samstarvstrupulleikunum hesi seinastu árini stava frá, at tú ikki fekk starvið sum fyrstilærari?

– Tað er ikki rætt. Tað, sum tvørturímóti nívir Ingun Simonsen, er, at hon als ikki varð innstillað til starvið. Skúlastýrið í Skopun innstillaði bara meg til starvið og vildi ikki innstillað hana yvirhøvur og tað er hon ongantíð komin yvir, sigur Sigurd Bærentsen.

Annars sigur hann, at hann gleðir seg til at byrja í Meginskúlanum, tí hann ivast ikki í at fáa góða móttøku har hann ætlar sær at byrja við opnum sinni og ivast ikki í, at samstarvið fer at ganga væl.

– Kanska kann eg taka onkur av mínum gomlu tiltøkum uppaftur. Eitt nú hevði eg kvøldskúla í gittarspæli í 10 ár, men tá ið hon var komin, misti eg hugin, sigur hann at enda.


**Tøkk**

Hjartans tøkk øll tit, sum komu – bæði innanlands og uttanlands – til mín 80 ára føðingardag. Takk øll tit, ið við hjálpsomum hondum gjørdu mær dagin ógloymandi.

Takk øll somul.

**Katrina Einarsson, Rituvík**




# Byggja fjós til 20 ross



*Fyrr í tíðini var neyðugt at hava ross til alt tað tunga arbeiðið, vit í dag hava maskinur til. Men hóast tað verður rossið ongantíð óneyðugt*
*Mynd: William West*

**Vaksandi áhugi í Klaksvík fyri at hava ross ger, at Norðoya Rossafelag ætlar at keypa grundøki uttan fyri býin. Ætlanin er at byggja fjós, sum kann húsa 20 rossum**

FRÍTÍÐARÍTRIV
*Rúna Sivertsen*

Ólavur Johannesen, sum hevur verið formaður í Norðoya Rossafelag síðani tað varð stovnað í 2000 sigur, at tað eru 14 ross í Klaksvík.

- Í løtuni húsast rossini runt um í býnum, og nú tey eru blivin so nógv í tali, hevði verið gott at fingið eitt felags fjós, sigur Ólavur. Klaksvíkar Býráð hevur eisini heitt á felagið, um at fáa rossini út um býin, sigur hann.

- Ætlanin er, at keypa eitt grundøki á Norðoyri til fjós, sum kann húsa 20 rossum. Felagið hevur fáar limir og vóna vit at fáa stuðul frá býráðnum, sigur Ólavur.

Umframt Ólavur Jóhannesen, sita Valborg Laksáfoss og Nichels Lützen í nevndini hjá Norðoya Rossafelag.

### Ymisk tiltøk

Rossini verða nýtt til bæði gaman og álvara. Á norðoyastevnu eru tey við í skrúðgonguni og á jólum, tá jólaskipið kemur á Klaksvík, eru rossini altíð og taka ímóti jólamonnunum.

Á norðoyastevnu verður vanliga skipað fyri ponyríðing, sum felagið fær nakað av vinningi av. Felagið er við í kappingum, har tey luttaka í 2. flokki, og ikki er sørt, at onkrum hevur eydnast at vunnið steyp. Eisini verða hestarnir nýttir til menningartarnað og rørslutarnað.

- Vit keyptu ross til son okkara, sum er spastikari. Ríðing er serstakliga gott hjá teimum, sum ikki kunnu ganga sjálvi. Hesturin hevur somu rørslur sum menniskju, tí fær tann rørslutarnaði íðka teir vøddar, sum annars verða ónýttir, sigur Ólavur.

Ólavur sigur, at hestarnir eisini verða nýttir til arbeiðis.

- Til dømi kann eg nevna, at rossini vóru við at bera kunsttøð, sum skuldi brúkast til at taða arrið eftir skriðulopið fyrraárið.

Fyrr í tíðini var neyðugt at hava ross til alt tað tunga arbeiðið, vit í dag hava maskinur til. Men hóast tað verður rossið ongantíð óneyðugt.

- Sjálvur eri eg við í Norðoya Bjargingarfelag - sum maður á hestbaki, sigur Ólavur Jóhannesen at enda.



*Rossini verða nýtt til bæði gaman og álvara. Á Norðoyastevnu eru tey við í skrúðgonguni og á jólum, tá jólaskipið kemur á Klaksvík, eru rossini altíð og taka ímóti jólamonnunum*
*Mynd: William West*


**Föroya Bjór Avgreiðslan**




**Nei**, Føroya Bjór avgreiðslan í Havn er ikki farin fallit. Tá Anna Petersen legði frá sær fyri aldur í august 2000, seldi hon felagið til Føroya Bjór, sum nú hevur tikið felagið av. Avgreiðslan er nú deild av Føroya Bjór, við Petur Petersen sum deildarleiðara.
Hølið til nýggja avgreiðslu verður bygt uppí nú. Byggiarbeiði fer at darva nakað, men vit rokna ikki við at avgreiðslutíðin sum var 1/2 til 1 minutt, fer upp um 2 minuttir kortini.
Um tit hjálpa okkum við ikki at hava leysar fløskur við hósdag og fríggjadagm gongur tað betur.


Sp/f Føroya Bjór – Avgreiðslan í Tórshavn í likvidatión

Föroya Bjór



**Ekspeditrisa**
til bakaran í SMS

Bakarin í SMS sóknast eftir fólki til sølubúðina at byrja skjótast tilber.

Arbeiðstíðin er sett til uml. 30 tímar um vikuna við skiftandi vaktum.

Løn eftir sáttmála við S & K.

Er hetta nakað fyri teg, so send eina skrivliga umsókn til Bakaran í SMS.

Tú kanst eisini seta teg í samband við Eirik, um tú vilt hava meira at vita um starvið, tlf. 31 30 46.

*Miklagarður er størsti matvøruhandil í Føroyum við eini gólvvídd upp á 1700 fermetrar og við meira enn 10000 vørunumrum. Í Miklagarði starvast uml. 80 fólk.*

MIKLAGARÐUR
SMS • Postboks 1069 • 110 Tórshavn • Tel 31 52 62